## Stevnubólkur heima:

***Uppgáva:*** Í samband við kappingar í Havn at syrgja fyri, at kappingarleiðari verður útnevndur og innbjóðing verður send út*, og møguliga samskifta við útnevnda høvuðsdómaran. (*Kappingarleiðarin kann gott vera í bólkinum*)

Biðja hjálparfólk til allar stevnupartarnar, og annars ansa eftir, at nokk av hjálparfólkum eru tøk**.
Í samstarvi við kappingarleiðaran at fyrireika venjara- og hjálparfólkafundir, herundir at útskriva skrá, útflýggja skrá til venjarar. Gera mappurnar til hjálparfólkini klárar, hava stopp-ur, vendiplátur og eyðkennisbúnar til hjálparfólkini klárar. Skaffa fólk til at rigga høllina til og av, skaffa ljóðanlegg, hava ábyrgdina av, at høllin verður latin upp, tá hon skal, og ansa eftir, at hon verður stongd um kvøldið, og at hon verður leverað í sama standi sum vit fingu hana, tó ikki vaska. Hava yvirskipaðu ábyrgdina av, at svimjikappingarnar, sum HS skipar fyri, vera skipaðar og gjøgnumførdar á høgum - og fyri svimjararnar - nøktandi støði.

***Sumt av hesum verður gjørt í samráð við **Kantinubólkinum og *Kappingarskrá-bólkin.***

***Limir:*** **Eirikur Hofgaard, Claudia Bjarnastein, Ester Simonsen, Ingun Eidesgaard**

## Stuðulsbólkur:

***Uppgáva:*** Í samstarvi við høvuðsvenjara felagsins skipa fyri t.d. stuðulssvimjingin, eins og skipa fyri øðrum tiltøkum fyri at fáa pening til vega til rakstur av felagnum, sum køkutombola, fløskuinnsavning og lutaseðlar, og at finna stuðlar annars.

***Limir:*** **Ólavur Weihe (mangla 1-2 fólk afturat)**

## Trivnaðarbólkur børn:

***Uppgáva: T.d. s***kipa fyri jólatræshaldi og grilltiltaki fyri svimjiskúlanum, ávikavist í desember og juni, umframt møguliga onnur undirhaldstiltøk og/ella svimjikappingar fyri tey smæstu børnini í felagnum.
Tað kann vera, at bólkurin hevur heilt onnur uppskot - ongantíð betur :)

***Limir:*** **Magni Mohr, Annika í Dímun, Ingun Schiller, Elsebeth W. Olsen**

## Svimjiskúlin:

***Uppgáva:*** Hava samskiftið við venjarar, húsavørðar og foreldur um hendi, umframt kunning annars. Halda limalistar ajour, evt. gera facebook-bólkar fyri liðini og umsita teir saman við venjarunum. Skipa fyri, at tey á bíðilistanum fáa bjóðað pláss. Hjálpa tilmeldingarbólkinum við uppstartinum. Halda skil á, um limagjaldið verður goldið, o.n.a.

***Limir:*** **Rúna í Skála (mangla 1-2 fólk afturat)**

## Ferðabólkur:

***Uppgáva:*** Skipa fyri øllum í sambandi við luttøku hjá HS í 25m- og 50m-svimjikappingum, sum ikki eru í Havn, s.s. ferðing, flutningi, innkvartering, innkeyp og matgerð. Taka ímóti gjaldi frá luttakarunum, og avrokna við kassameistran. Harafturat syrgja fyri, at minst trý hjálparfólk eru til sjálva svimjikappingina, og at minst fimm foreldur eru at hjálpa til, har svimjararnir eru innkvarteraðir.

***Limir:*** **Sólrun Joensen, Hjørdis Johannessen (manglar 1 fólk afturat)**

## Kantinubólkur:

***Uppgávur:*** Hava kantinuna um hendi, tá HS skipar fyri svimjikappingum, og hjálpa SSF til FM t.d., og í heila tikið, tá kappingar og líknandi eru í Havn. ***Hjálpa Stevnubólkinum***

***Limir:*** **Heidi Thomsen, Aina Knudsen, Sylvia Thomassen**

## Kappingarskrá-bólkur:

***Uppgávur:*** Gera kappingarskrá til kappingarnar í Havn, senda innbjóðing og gera Grodan-fílu. Hava telduna um hendi, meðan kappingin er í gongd. ***Samstarva við Stevnubólkin***

***Limir:*** **Jóannes H. Á Fløtti, Martin Dam, Søren Antoft**

## Heimasíðubólkur:

***Uppgávur:*** Leggja tilfar út á heimasíðuna, og evt. laga hana til virksemið felagsins

***Limir:*** **Martin Dam, Jóannes á Fløtti Huusgaard**